

KRINGVARP FØROYA

# Ársfrágreiðing 2025

# Kringvarpið

# – pallurin, har allir føroyingar hittast

Vit taka tey mál upp, sum hava týdning fyri teg. Tí eru vit fremsti mentanarberi føroyinga. Endamálið hjá Kringvarpi Føroya er at veita eina public service-tænastu, sum savnar, undirheldur og ríkar.

# Innihald


Formæli 4

Framleiðsla 6

Nýtsla og hagtøl 10

Aktuelt 16

Ítróttur 21

Mentan 24

Átrúnaður 30

Børn og ungdómur 33

Tónleikur 37

Public service 41





**Kringvarp Føroya**
**Ársfrágreiðing 2025**

**Forsíðumynd**
Bjarni Árting Rubeksen

**Myndir**
Bjarni Árting Rubeksen
og egnar myndir

**Uppseting**
Eyðbjørg Sigurdsdóttir Andreasen

# Formæli

**Júst hetta, at vera við til at seta dagsskránna, er ein av høvuðs-uppgávunum hjá Kringvarpinum sum public service-miðil. Tað áliggur okkum sum ein grundleggjandi skylda, og tað er beinleiðis ásett í public service-sáttmálanum við Mentamálaráðið, at Kringvarpið varpar ljós á og elvir til kjak um samfelagsviðurskifti.**

*"Heima í stovunum sóu vit løtur, ið mundu brenna seg í minnið, og sum fara at standa eftir sum føroysk ítróttarsøga."*

**Magnus Dam**, kringvarpsstjóri,
um føroysku ítróttaravrikini í 2025

Ársins orð í 2025, sum Kringvarpið avdúkaði í desember í fjør, var Suðuroyartunnil. Tað skerst ikki burtur, at málið um Suðuroyar-tunnilin var ovarliga á dagsskránni bæði í Kringvarpinum og í samfelagskjakinum sum heild í fjør. Sendingin "Suðuroyartunnilin og skuggatølini" var ein av mongum heimildarsendingum, sum blivu sendar í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum í fjør, og tað skuldi vísa seg, at orðaskiftið um sama tunnil hevði stóra ávirkan á, at løgmaður nakað eftir ársskiftið útskrivaði løgtingsval til at vera tann 26. mars 2026.

Júst hetta, at vera við til at seta dagsskránna, er ein av høvuðs-uppgávunum hjá Kringvarpinum sum public service-miðil. Tað áliggur okkum sum ein grundleggjandi skylda, og tað er beinleiðis ásett í public service-sáttmálanum við Mentamálaráðið, at Kringvarpið varpar ljós á og elvir til kjak um samfelagsviðurskifti.

Hetta er tó bert ein av mongum skyldum, Kringvarpið hevur sum einasti føroyski public-service-miðil.

Í public service-sáttmálanum stendur harumframt, at *"Kringvarpið skal miðla og mynda føroyska mentan í breiðastu merking."* Og har stendur eisini, at *"Kringvarp Føroya skal framleiða og senda dygdargott tilfar, sum fólkið kann kenna seg aftur í, og á henda hátt virka fyri, at øll fólk gerast betur før fyri at taka støðu til og ávirka samfelagsgongdina fólkaræðisliga. Hetta merkir, at stovnurin bindur seg til at tryggja eitt breitt útboð av sendingum og tænastum fyri alt Føroya fólk umvegis ymiskar pallar."*

Í 2025 rókti Kringvarpið hesar skyldur við at framleiða 740 tímar av føroyskum sjónvarpstilfari, eitt enn hægri tímatal av føroyskum útvarpstilfari og túsundtals greinar á heimasíðuni kvf.fo. Umframt eitt stórt úrval av barnatilfari á VIT-appini.

Á tíðindasíðuni settu onnur stórmál eisini sín dám á tíðinda-flutningin í Kringvarpinum. Bústaðarneyðin og vantandi møgu-leikarnir hjá unga ættarliðnum at fáa føtur undir egið borð, høga og lutfalsliga alt ov høga talið av arbeiðsvanlukkum í Føroyum, málið um avloysaraferjuna Galaxy, ið sigldi við opnum hekkuportri, nýskipanarnevndin hjá landsstýrinum og spurningurin um trygd og tilbúgving vóru øki, sum fyltu nógv í tíðindarenslinum hjá Kringvarpinum í 2025.

Stórir og tungir samfelagsligir trupulleikar, sum ofta lýsa eina dapra mynd av føroyska samfelagnum.

Tað sama ber ikki til at siga, tá ið føroysku ítróttaravrikini í 2025 skulu lýsast.

Við teimum 12 stigunum, sum føroyska fótbóltslandsliðið endaði við í HM-undankappingini, setti nýggja venjaratoymið hjá landsliðnum met. Hetta er besta úrslit nakrantíð í einari undankapping, og hæddarpunktið mundi vera, tá ið landsliðið vann 2-1 á Kekkia á Tórsvølli 12. oktober í fjør. Kringvarpið stóð sum vant fyri sjónvarpsframleiðsluni.



**Ávikavist 40% og 60% av teimum spurdu í einari brúkarakanning hjá Kringvarpinum søgdu, at ávikavist sjónvarpið og útvarpið hjá Kringvarpinum eru høvuðskeldurnar til tey tíðindi, tey fáa í gerandisdegnum.**

Kringvarpið var eisini við, tá ið ein onnur søgulig hending fór fram í Trier í Týsklandi. Har luttók føroyska kvinnulandsliðið í hondbólti fyri fyrstu ferð í einari heimsmeistarakapping, og kvinnurnar gjørdu ikki mætari enn at spæla seg víðari úr innleiðandi bólkaspælinum við sigrum á Spania og Paraguei. Í meginumfarinum í Dortmund fingu kvinnurnar enn eitt stig, tá ið tær leiktu javnt móti Serbia.

Heima í stovunum sóu vit løtur, ið mundu brenna seg í minnið, og sum fara at standa eftir sum føroysk ítróttarsøga.

Føroyskir íðkarar skrivaðu somuleiðis ítróttarsøga á sumri í 2025, tá ið Føroyar vunnu Oyggjaleikirnar á Orknoyggjum fyri fyrstu ferð síðani 2009. Eitt frálíkt útgangsstøði, áðrenn Føroyar skulu hýsa leikunum í 2027.

Kringvarpið varpar serligt ljós á føroysku ítróttaravrikini eina ferð um árið í sendingini "Ítróttarfagnaðurin", har einstøk avrik, felagsskapir og fólk fáa serligan heiður.

Ítrótturin hevur serligan týdning fyri Kringvarpið, og hann megnar at savna føroyingar í eini tíð, har miðlavanarnir í alt størri mun verða ávirkaðir av útlendskum, talgildum miðla- og samskiftispallum.

Tað er framvegis eitt av aðalmálunum hjá Kringvarpinum, at 4 av 5 føroyingum skulu brúka onkran av pallunum hjá Kringvarpinum hvønn dag, og okkara brúkarakanningar vísa, at Kringvarpið framvegis hevur góða undirtøku millum hyggjarar, lurtarar og lesarar, tó at vit ikki enn hava rokkið málinum.

Ávikavist 40% og 60% av teimum spurdu í einari brúkarakanning hjá Kringvarpinum søgdu, at ávikavist sjónvarpið og útvarpið hjá Kringvarpinum eru høvuðskeldurnar til tey tíðindi, tey fáa í gerandisdegnum.

Arbeitt verður framvegis eftir teimum trimum høvuðsleiðunum, sum public service-sáttmálin vísir á: at styrkja tøkniliga undirstøðukervið, menna framleiðsluna á sjónvarps-, útvarps- og netsíðuni og at styrkja førleikarnar hjá starvsfólkunum.

Men arbeiðið steðgar ikki her. Talgilda menningin heldur fram, miðlavanar broytast, og kappingin um tíðina hjá brúkarunum verður støðugt harðari. Júst tí verður tørvurin á einum sterkum føroyskum public service-miðli enn størri komandi árini.

Í sambandi við málmenningina hjá børnum hevur Kringvarpið somuleiðis stóran týdning, tí tað eru ikki aðrir framleiðarar av føroyskum tilfari til børn.

Ein av stóru og nýggju eginframleiðslunum í 2025 var væl dámda røðin KAKUMiKS, har 16 føroysk børn kappast um at baka bestu og vakrastu kakuna. Talan er um afturvendandi røð, og stórur áhugi er fyri bæði at luttaka í og at síggja spennandi og litføgru sendingarnar. Og vilja børnini sjálvi royna seg í køkinum heima við hús, ber til at síggja allar køkuuppskriftirnar á lættlesiligan hátt á heimasíðuni hjá Kringvarpinum. Eitt gott dømi um, at meirvirði fæst úr einari sjónvarpsframleiðslu, og at hon ikki bara "livir" ta tíðina, hon er á skíggjanum.

Hvønn morgun sendir Kringvarpið barnaútvarp, og á sjónvarpssíðuni kunnu børnini síggja kendar røðir við føroyskum røddum nærum hvønn dag í vikuni. VIT-appin við føroyskum sjónvarpstilfari er sera væl dámd, og arbeitt verður við at menna tilboðið til føroysku børnini, eitt nú á hesum pallinum.

Ein annar pallur, ið Kringvarpið trein inn á í 2024, er stóri biografpallurin í Havnar Bio. Aftur í fjør sluppu føroysk børn í biograf í heystfrítíðini at síggja kendan teknifilm við føroyskum røddum. Í fjør var tað Palli Halaleysi, sum dró túsundtals børn í biografin, og aftur í ár er ætlanin at bjóða børnunum at síggja kendan film við føroyskari talu.

Týdningurin av at lata kendar teknifilmshetjur tosa føroyskt skal ikki undirmetast, um vit skulu meta út frá talinum á teimum, ið leita í biografin hesar dagarnar.

Í 2025 stóð sendiskráin til vaksna hyggjaran og lurtaran av eini rúgvu av nýframleiddum tilfari, men eisini av góðum, gomlum úr savninum. Skjótt 70 ára gamla søgan hjá Útvarpi Føroya, Sjónvarpi Føroya og Kringvarpi Føroya er goymd á bondum, teldum og skjølum í savninum hjá Kringvarpinum. Verkætlanin Savnsgull hevur seinastu árini tryggjað, at søgan er varðveitt. Alt tilfarið er talgilt, og í 2025 varð aftur sett ferð á verkætlanina.

Í 2026 er ætlanin at fara undir at lata savnið upp, so almenningurin sleppur at kaga í rúgvismikla tilfarið, sum liggur í goymslunum í Kringvarpinum. Soleiðis fæst lív í eldri tilfar, sum eisini verður nýtt á nýggjan hátt.

Mentanarligt og átrúnaðarligt tilfar í bæði sjónvarpi og útvarpi er stórur partur av sendiskránni hjá Kringvarpinum.

Í sjónvarpinum stóðu mentanarsendingar fyri 35 % av føroyskt framleidda tilfarinum, átrúnaður fyri 10 %, og tónleikasendingar vóru 8 % av samlaðu framleiðsluni. Á útvarpssíðuni fyltu mentanarsendingar 13 % av sendiflatuni, átrúnaður 5 % og tónleikurin stóð fyri 60 % av tí, kringvarpið sendi. Útvarpið sendir 24 tímar um samdøgrið, og av øllum tónleikinum, ið verður spældur, eru 65 % føroyskur tónleikur.

Stór undirtøka er fyri at velja ársins útvarpshitt. 10.420 atkvøður komu inn, tá ið valið fór fram, og Tú skal syngja tær ein sang hjá Jóannesi Joensen, betur kendur sum Bass Elvis, fekk flestar atkvøður, tá ið upptalt varð.

Mín vón er, at Kringvarpið eisini frameftir verður fremsti pallur hjá føroyingum, sum vilja hittast um stórar, felags upplivingar, fáa vitan, uppliva føroyska mentan, hoyra føroyskan tónleik og kenna seg sum part av sama felagsskapi.

Við ynskjum um eitt gott kringvarpsár.

**Magnus Dam, kringvarpsstjóri**

# Framleiðsla



# Framleiðsluyvirlit

Yvirlitið vísir egna framleiðslu í Kringvarpinum.
Bólkarnir fevna um hesar sendingar:

### Aktuelt
Útvarpstíðindi, Dagur og vika, tíðindafundir, stuttdokumentarar og Breddin.

### Tónleikasendingar
Tónleikasendingar í útvarpi og sjónvarpi, FMA og aðrar konsertir.

### Infotainment
Orðið er heiti fyri sendingar, ið kunnu bólkast sum bæði “information” og “entertainment”. Hesar sendingar eru undir bólkinum Infotainment: Góðan Morgun Føroyar, Vikuskiftið, Ólavsøkuprát, Gekkurin, Summargestir o.l.

### Børn og ung
Barnaútvarpið, barnasendingar í sjónvarpinum, ungdómssendingar – eitt nú Kvøldvaktin og aðrar sendingar, sum ung framleiða.

### Átrúnaður
Morgunlestrar, andaktir, gudstænastur, møti og aðrar sendingar um átrúnað.

### Mentan
Mentanarsendingar, Vikan, siðsøga, samrøður, frásagnir, náttúrusendingar, dokumentarsendingar, framhaldssøgur, stuttsøgur, tónleikasendingar við samrøðum, ymsar sendingar um høgtíðir o.l.

### Ítróttur
Ítróttasendingin í útvarpinum um vikuskiftið, 3-2 í sjónvarpinum, frásagnir frá fótbólti og hondbólti, finalur í hondbólti, flogbólti, fótbólti, svimjing, badminton, borðtennis og judo, landsdystir í fótbólti og onnur føroysk luttøka í altjóða kappingum.

### Sendingar, sum falla uttan fyri bólkingarnar
Tingvarpið í sjónvarpinum og veðurtíðindi.

| Bólkar | Útvarp | Sjónvarp | Tímar tilsamans |
|---|---|---|---|
| Aktuelt | 540 | 115 | 655 |
| Tónleikasendingar | 5.317 | 62 | 5.379 |
| Infotainment | 929 | 37 | 966 |
| Børn/ung | 257 | 130 | 387 |
| Átrúnaður | 433 | 75 | 508 |
| Mentan | 1.143 | 262 | 1.405 |
| Ítróttur | 195 | 59 | 254 |
| **Samanlagt** | **8.814** | **740** | **9.554** |

Yvirlitið vísir einans føroyska framleiðslu

## Yvirlit yvir føroyskt framleitt tilfar til útvarpið




**Útvarp**
8.814 tímar

## Yvirlit yvir føroyskt framleitt tilfar til sjónvarpið

**Sjónvarp**
740 tímar






# Nýtsla og hagtøl

# KVF hevur framvegis gott tak í føroyingum




**Síðani februar 2016 hevur Spyr.fo regluliga kannað álit føroyinga á Kringvarpinum og nýtsluna av pallum Kringvarpsins.**

500 fólk í aldrinum 18-80 ár í øllum landinum verða javnan spurd, hvørjum sendingum tey hava lurtað eftir og hugt at, hvussu miðlanýtslan er sum heild, og hvussu tey brúka pallarnar hjá Kringvarpinum. Eitt av strategisku málunum hjá Kringvarpinum er at røkka 80% av føroyingum hvønn dag.

Tílíkar spurnarkanningar skulu takast við ávísum fyrivarni, men tær geva góðar ábendingar.

**Brúkarakanningarnar vísa, at KVF hevur nógvar hyggjarar og lurtarar**

Brúkarakanningar gjørdar fyri mánadag til sunnudag í ávikavist februar/mars og oktober/november í 2025, t.e. tvær heilar vikur, vísa, at sendingarnar hjá Kringvarpinum framvegis eru væl umtóktar.

Tølini fyri einstøku sendingarnar eru góð. Útvarpstíðindini kl. 12.20 og kl. 18 hava áhaldandi høg lurtaratøl og hava millum 45 og 50% av lurtarunum. Eisini Breddin er væl lýddur, eitt nú lurtaðu 28% eftir aktualitetssendingini fríggjadagin 21. november.

Tað eru tó ikki bara tíðindi og aktualitetur, sum upptaka uppmerksemið hjá føroyingum. Heili 50% lurtaðu eftir Góðan morgun Føroyar mikudagin 12. november, endursendingin íroknað. Lurtaratølini fyri Góðan morgun Føroyar hava verið høg í nógv ár, so sendingin má sigast at hava ein trúfastan lurtaraskara.

Morgunlesturin hevur somuleiðis fasta og breiða undirtøku gerandismorgnar. Eitt nú lurtaðu 37% – endursendingin íroknað – mikudagin 12. november 2025, og 32% lurtaðu fríggjadagin 7. februar.

Sendingar, har vertirnir samskifta við lurtararnar, eitt nú við sms-boðum, kunnu vit enn einaferð staðfesta góð tøl fyri. Her kunnu vit nevna Skratsj, Vikuskiftið og Tit skriva, vit spæla, sum allar hava lurtaratøl, ið liggja um 30%.

*"Sum almennur miðil hava vit m.a. ábyrgd fyri at savna og upplýsa. Tað gleðir okkum, at føroyingar framvegis velja public service-tilboðið, hóast miðlavanarnir eru broyttir nógv seinastu árini"*, sigur kringvarpsstjórin.

# Meira enn 50% hyggja at Degi og viku

Tølini staðfesta, at Dagur og vika og ítróttur eru mest sæddu sendingarnar í vanligu sjónvarpsskránni. Týskvøldið 11. februar 2025 hugdu 58,54% at Degi og viku – endursendingin íroknað – og mánakvøldið 13. oktober hugdu 62,6% at Degi og viku við 3-2.

*"Hetta samsvarar eisini væl við, at ávikavist 40% og 60% av teimum spurdu í einari kanning í vár søgdu, at ávikavist sjónvarpið og útvarpið hjá Kringvarpinum eru høvuðskeldurnar til tey tíðindi, tey fáa í gerandisdegnum"*, sigur Magnus Dam.

Hondbóltsdysturin hjá kvinnum móti Montenegro leygardagin 18. oktober dró 40% av svargevunum til skíggjan. Hyggjaratølini fyri ítrótt eru sum heild góð; Dagur og vika við 3-2 mánakvøld hevur sum oftast eitt vet fleiri hyggjarar enn hinir dagarnir.

Kringvarpið hevur eisini rættiliga væl fatur í børnunum. Í miðal brúka umleið 30% VIT-appina dagliga, meðan tølini fyri barnaløtuna í sjónvarpinum liggja millum 20 og 30%. Í kanningunum verða bert tey við heimabúgvandi børnum í aldrinum 2-13 ár spurd um barnatilfarið.

## Hvat kunnu vit brúka tølini til?

Public service-sáttmálin áleggur Kringvarpinum at gera kanningar við jøvnum millumbilum fyri at halda eyga við, hvussu gongdin er við nøgdsemininum, álitinum og nýtsluni hjá brúkarunum.

Kanningar sum hesar vísa, hvussu hyggjarin og lurtarin brúka Kringvarpið, og í ávísan mun hvat tey halda um Kringvarpið. Hvussu flyta tey seg millum ymsu pallarnar, ið eru at velja ímillum? Nær lurta og hyggja tey eftir Kringvarpinum, og nær brúka tey poddvørp, og nær og í hvussu stóran mun brúka tey Netflix, DR og TV2? Miðað verður eftir at gera slíkar kanningar umleið tvær ferðir um árið.

## Hvussu ofta brúkar tú hesar miðlar?



## Hvørja tøkni brúkar tú í størstan mun til at útvega tær tíðindi?




## Hvørjar eru tínar høvuðskeldur til tíðindi í gerandisdegnum?



# Talgildir miðlar

Á pallum Kringvarpsins er ein ørgrynna av kunnandi, mennandi og undirhaldandi tilfari. Heimasíðan – kvf.fo – og sosialu miðlarnir eru ein sýnisgluggi inn í henda fjølbroytta heim. Við sosialu miðlunum eru vit til staðar, har fólkið er, og vit minna á, hvat Kringvarpið bjóðar. Í flestu førum verða fólk á sosialum miðlum beind inn á kvf.fo, har alt sjónvarps- og útvarpstilfar er tøkt.

Niðanfyri eru lyklatøl frá heimasíðuni og vangunum hjá Kringvarpinum á Facebook og Instagram.

# Lyklatøl frá kvf.fo

- Heimasíðan er vitjað tilsamans **29.415.887 ferðir**
- **516.000** ymsir brúkarar ella eindir vóru á heimasíðuni
- **74,4%** av vitjanunum á heimasíðuni vóru um fartelefon ella teldil
- **59%** brúktu iOS (iPhone ella iPad)

**Flestu fólk, sum vitjaðu kvf.fo í 2025, vóru í:**

| | |
|---|---|
| Føroyum | **81,33 %** |
| Danmark | **16,3 %** |
| Stóra Bretlandi | **3,02 %** |
| Norra | **2,57 %** |
| Íslandi | **1,31 %** |
| Týsklandi | **1,3 %** |

Serliga ítrótturin er savnandi; hondbólturin – EM-undankapping hjá monnum, U21 HM-medaljuhandan og HM-endaspæl hjá kvinnum – fekk sera nógvar hyggjarar bæði heima og uttanlands at tendra stroymin á kvf.fo





# 10 tær mest lisnu greinarnar á kvf.fo

1. Nýggj poddvarpsrøð: – Eg eri blivin kallað bæði “hora” og “golddigger”
2. Stjóri ákærdur fyri at stjala milliónir
3. SF25: Vágsbøur bleiv eitt schlager-helviti leygarkvøldið
4. Smyril Line: “Ein syrgiligur dagur hjá okkum øllum”
5. Bjarki Hansen sang saman við Bryan Adams
6. Ferðafólk farið fyri borð á Norrønu
7. Fylg við beinleiðis: Kongshjúnini á vitjan í Føroyum
8. Ferðafólk fyri borð: Rokna ikki longur við at finna persónin á lívi
9. TV2: Ein deyður og ein í lívsvanda eftir spreinging umborð á Glyvursnesi
10. – Hugsa teg væl um, áðrenn tú gerst limur í lutaíbúðarfelagsskapi

# Lyklatøl frá Instagram og Facebook

Tilfarið hjá Kringvarpinum á Facebook er víst tilsamans **32,1 milliónir** ferðir í 2025, og tað hevur fingið **271.000 reaktiónir.**

Fyri kringvarpsvangan á Instagram er galdandi, at tilfarið er víst **2 milliónir** ferðir í 2025, og **32.600 ferðir** hava brúkararnir dámt ella viðmerkt.

3.400 fólk eru løgd afturat fylgjaraskaranum á Facebook í 2025, og 1.900 á Instagram. Tilsamans hevur Kringvarpið 35.000 fylgjarar á teimum báðum sosialu miðlunum.




Væl dámd uppsløg á sosialum miðlum



# Aktuelt

# Holið í sjógvin

**Aktuelt setir regluliga fólk av til at fara í dýpdina við einum evni ella einum máli. Ofta er produktið ein dokumentar-sending, sum síðani krevur uppfylging og orðaskifti í tíðindasendingum, á netinum og í Breddanum.**

Í 2025 var átroðkandi at fáa lýst ætlanina um at bora ein Suðuroyartunnil út í æsir og at fáa øll ivamál fram og inn í opið samfelagskjak.

Suðuroyartunnilin er størsta einstaka verkætlan, sum vit sum land nakrantíð eru farin undir, og sendingin “Suðuroyartunnilin og skuggatølini” var ein roynd at lýsa avleiðingarnar fyri búskapin og náttúruna.

Sum heitið á sendingini sigur, var niðurstøðan í sendingini, at ikki alt bleiv fortalt – millum annað var stór faklig ósemja um fíggingarleistin og veruliga kostnaðin av tunlinum.

Ein orsøk til, at farið varð undir sendingina, var, at tað gjørdist greitt, at stór faklig ósemja var um tað, sum lá í kortunum, bæði tá tað kom til trygd og tunnilsleið.

Tað gjørdist síðani eisini greitt, at løgtingsfólk, sum skuldu taka støðu til verkætlanina ikki hildu seg vita nokk um hana til at kunna taka eina avgerð.

Faklig ósemja var somuleiðis um trygdarkrøv og loysnir. Vit hava í Føroyum ongar reglur um hesi viðurskifti, og sendingin lýsir tí, hvørji krøv verða sett til trygd aðrastaðni, eitt nú í Noreg og ES. Í sendingini kemur millum annað fram, at ein nýggjur tunnil í somu longd skal liva upp til heilt onnur krøv í okkara grannalondum, enn tað, sum mann ætlar at gera í Suðuroyartunlinum. Eitt nú er tað krav, at ein neyðútgongd er í einum slíkum. Eitt annað endamál við sendingini var at vísa fólki, hvar ætlaða farleiðin var, og hvørji alternativ vóru til tað, sum P/F Suðuroyartunnilin vildi. At lýsa munin á, um tunnilin fer úr Djúpadali ella norðan fyri Sands bygd, tá tað kemur til kostnað og fyrilit fyri náttúruni.




Eftir “Suðuroyartunnilin og skuggatølini” var drúgt og hvast kjak víða um í samfelagnum um tunnilsætlanina – eins og áður, men nú við fleiri upplýsingum, tora vit at siga.





## Breddin gevur tíðindunum djúpd

Aktuelt framleiddi 99 Bredda-sendingar í 2025. Breddin er ein útvarpssending, sum rúmar kjaki, kritiskum samrøðum, reportasjum og longri, framleiddum innsløgum. Evnini eru ofta slík, sum hava verið frammi í tíðindarenslinum, men kunnu eisini vera heilt nýggjar søgur. Endamálini við Breddanum eru sostatt at geva tí, ið rørir seg, djúpd, at lýsa týðandi mál frá fleiri sjónarhornum og frá ymsum persónum, og at gera longri, kritiskar samrøður við tey, sum sita við valdi og ábyrgd á ymsum postum.

Í 2025 var Bredda-redaktiónin aloftast tveir journalistar, har annar eisini var redaktørur. Harumframt fekk Breddin í alt størri mun ein framleiðara knýttan at sær, tí dentur varð lagdur á at gera stroymingina á netinum til so góða uppliving sum gjørligt.

Størri parturin av Bredda-evnum snúgva seg um føroysk mál, men ein fittur partur av tíðini verður nýttur til at hyggja at altjóða hendingum og rákum við føroyskum brillum. Brúkarakanningar og viðmerkingar frá lurtarum (og hyggjarum) hava seinastu árini víst, at føroyingar heilt greitt ynskja at fáa tilfar úr umheiminum á føroyskum og frá Kringvarpinum.

Í 2025 høvdu bæði Breddin og annars nógvar av tíðindasendingum okkara amerikanskan politikk serliga ofta á skrá. Orsøkin var uttan iva sermerkta stýrislag og orðalag forsetans, sum bæði leikfólk og serfrøðingar gjørdust upptikin av. Eisini politisku rákini í Evropa fingu rúmd. Krígsdimmið á meginlandinum fekk okkum at spyrja tey ráðandi og tey, ið varða av trygdini herheima, hvat føroyingar hava orsøk at óttast, og hvat land og fólk eiga at brynja seg til? Ikki fyri at leypa ótta á, men fyri at geva fólki ein møguleika sjálvi at meta um støðuna, og hvussu hon skal handfarast.

## Bústaðartrupulleikin brettir út

Trupulleikarnir hjá fólki at finna ein bústað, tey hava ráð til, varð settur undir sjóneykuna í 2025. Hetta var framhald frá 2024, tá vit viðgjørdu trupulleikarnar hjá almenna bústaðarfelagnum Bústaðir at fáa bygt til ein prís, sum í seinasta enda gjørdist til ein sámuligan leiguprís fyri brúkaran. Í 2025 steðgaðu Bústaðir á við nýggjum verkætlanum. "Tað er nú somikið dýrt at byggja í Føroyum, at almennu Bústaðir steðga á við verkætlanum, sum annars skuldu farið av bakkastokki í ár. Tað er ov dýrt at byggja", skrivaðu vit á kvf.fo.

Gjøgnum árið viðgjørdu vit lutaíbúðirnar á Dalavegnum í Havn, sum vóru ov dýrar til teirra, tær vórðu ætlaðar, vaksandi husaprísir og almennu ætlaninar um at fáa til vega fleiri bústaðir, fyrst við at byggja lestraríbúðir á Eirargarði í Havn. Móti endanum av 2025 vóru vit farin í holt við at granska bústaðarproblematikkin sum eina heild og fóru í holt við at fyrireika eina dokumentarsending um hetta.

## Hekkuportrið og varskógvarin

Eitt annað mál, sum kravdi áhaldni og ómak, snúði seg um avloysaraferjuna Galaxy. Ferjan fekk fyrst kritikk fyri, at kakkulakkur varð funnin og avmyndaður umborð, men stutt eftir fekk kritikkurin meira álvarsaman dám, tá ein mynd kom fram, sum vísti, at hekkuportrið á Galaxy var ikki latið aftur, men stóð á glopp, meðan ferjan sigldi. Myndin var í fyrsta umfari latin Kringvarpinum í trúnaði, og vit viðgjørdu málið, uttan at keldan varð nevnd. Men tá útlit vóru fyri, at myndugleikarnir fóru at lata málið fara aftur við borðinum, gjørdi keldan av at standa fram og greiða frá støðuni, tá myndin varð tikin. Innlit í skjøl frá Suðuroyar sjúkrahúsi og Strandfaraskipum Landsins vístu, at bæði hendan og ein onnur varskógvan frá sama portøri um vantandi trygd umborð á skipinum, sum røkir suðuroyarsiglingina, høvdu ført til eitt trýst frá Strandferðsluni um, at starvsfólk hjá sjúkrahúsinum ikki brúka sítt talufrælsi til alment at gera vart við seg, tá tey halda vanda vera á ferð. Kringvarpið gjørdi samrøðu við løgfrøðing, sum staðfesti, at fólk hava fullan rætt at varskógva, eisini alment, tá tey verða varug við vandafull viðurskifti, meðan tey eru til arbeiðis.

Málið um hekkuportrið á Galaxy og avgerðirnar, sum vórðu tiknar, skuldu kannast av løgfrøðingi, segði landsstýrið, men kanningin kom í drag og er pr d.d. ikki liðug.

## Fosturtøkulógin samtykt

Á politiska pallinum vóru – umframt Suðuroyartunnilin – serliga tvey mál, ið vaktu ans. Lógin um fosturtøku varð tikin framaftur, og ein nýskipanarnevnd varð sett at koma við uppskotum til reformar, ið kundu bjarga føroyska langtíðarhaldførinum.

Lógaruppskotið um at loyva fríari fosturtøku í Føroyum fall í løgtinginum í 2024, men varð tikið fram aftur eitt gott ár seinni. Hesa ferð var ein av uppskotsstillarunum eitt tingfólk hjá Sambandsflokkinum, Eyðdis Hartmann Niclasen. Hetta elvdi til rembingar í flokkinum, og fram standandi sambandsfólk meldaðu seg úr Sambandsflokkinum. Tí kom dekningur okkara bæði at snúgva seg um lógina sjálva og avleiðingarnar av henni, og so um politisku spenningarnar fram til atkvøðugreiðsluna. Í desember varð greitt, at lógin varð samtykt og sett at koma í gildi í juli 2026.





Aktuelt framleiddi

**99**

**Bredda-sendingar í 2025**

## Nýskipan og færri landsstýrisfólk

Aksel V. Johannesen, løgmaður, setti í september 2025 eina nýggja nevnd, sum fekk heitið "nýskipanarnevndin", við endamálinum at skjóta upp "nýskipanir, sum styrkja langtíðarhaldførið í vælferðarsamfelagnum", segði løgmaður. Ben Arabo, búskaparfrøðingur, varð settur á odda fyri nevndini. Hetta nýggja átakið fekk okkum at spyrja, um tað at gera reformar og loysnir til at tryggja vælferðina lá betur hjá eini úrvalsnevnd enn hjá teimum fólkavaldu? Tveir mánaðir seinni kom fyrsta tilmælið frá nevndini, sum varð fylgt. Almenna fyrisitingin skuldi minka, og hetta skuldi byrja í erva. Trý landsstýrisfólk vórðu skorin burtur, tí fimm landsstýrisfólk var eitt hóskandi tal at stýra landinum, metti nevndin. Kjak stóðst av avgerðini, og serliga eitt av frásettu landsstýrisfólkunum, Jóhan Christiansen, kritiseraði avgerðina og setti spurning við nyttuvirðið í henni. Nýskipanarnevndin kom ikki við fleiri tilmælum í 2025.

## Hví bíðar Jógvan enn eftir endurgjaldi?

"10. november vóru akkurát hálvtfimta ár, síðani óhappið hendi, og Jógvan bíðar enn eftir svari", søgdu vit í Dag og viku-innslagi, har Jógvan í Jógvansstovu greiddi frá óhappinum umborð á skipi, sum gjørdi hann óarbeiðsføran. Hóast hann, tá vit tosaðu við hann hálvtfimta ár eftir vanlukkuna, hevði verið til nærum 100 kanningar, var Arbeiðs- og brunaeftirlitið framvegis ikki klárt við nakrari niðurstøðu, sum kundi brúkast til at geva honum endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. Søgan hjá Jógvani var ikki fyrsta søga okkara í 2025 um stovnin, har Vanlukku-tryggingarráðið, Arbeiðseftirlitið og Brunaeftirlitið eru savnað. Vit fingu staðfest, at mannagongdirnar eru seinar, ringt er at fáa svar og yvirlit yvir sítt mál. Harumframt varð eisini staðfest, at talið av fráboðanum um vanlukkur er høgt sammett við onnur lond, og at talið av arbeiðsvanlukkum, ið krevja lív, er nógv hægri enn í hinum Norðurlondunum og hægri enn í flestu londum í Evropa. Okkara dekningur skjalfesti hetta, og landsstýrisfólkið á økinum, Margit Stórá, ásannaði í desember 2025, at økið má endurmetast, alt sum tað er.

Tíðindadeildin hjá Kringvarpinum hevur til uppgávu at fylgja við í tí, sum hendir í samfelagnum, og nógv av okkara orku fer til hetta. Men málini um Arbeiðs- og brunaeftirlitið, Suðuroyartunnilin og hekkuportrið á Galaxy eru dømi um, at tað er ikki nóg mikið at fylgja við. Vit mugu eisini kanna og grava í tí, ongin annar setir á dagsskrá og seta neyðugu orkuna av til at blíva við og treiskast.







# Ítróttur



# Hondbóltskvinnur, fótbóltsmenn og søguligir oyggjaleikir

**Føroyskur ítróttur stendur framvegis í føgrum blóma, og 2025 bjóðaði eins og undanfarin ár upp á nógvar stórar og spennandi løtur við okkara fremstu íðkarum.**

Hondbóltslandsliðið við kvinnum royndi seg í heimsmeistarakappinginini fyri fyrstu ferð og spældi seg í miðumfarið við fleiri góðum avrikum. Serliga minniligur var sigurin á Spania í bólkaspælinum, og avgerandi málið hjá Janu Mittún ímóti spaniólum varð eisini kosið til ársins ítróttarløtu á fagnaðinum hjá ÍSF.

Fótbóltslandsliðið við monnum undir leiðslu av Eyðuni Klakstein og Atla Gregersen hevði eisini eitt frálíkt ár. 12 stig komu á kontuna í HM-undankappingini fyri sigrar á Gibraltar, Montenegro og Kekkia. Hetta er met, og sigurin á Kekkia á Tórsvølli í oktober telist millum teir bestu, síðan Føroyar fóru upp í altjóða fótbólt.

Afturat hesum gjørdu Føroyar ikki mætari enn at vinna oyggjaleikirnar fyri fyrstu ferð síðan 2009 í Álandi og fyri bert aðru ferð í alt. Føroysku íðkararnir spentu seg veruliga út á Orknoyggjum, har teir vunnu ikki minni enn 41 gullmerki í m.a. fimleiki, svimjing, badminton og bogaskjóting.

Alt hetta fekk Kringvarp Føroya gleði av at varpa út til ítróttaráhugaðar føroyingar í sjónvarpi, útvarpi og á heimasíðu okkara, kvf.fo.








# 2025 í tølum

Yvirlitið niðanfyri vísir ítróttin, sum Kringvarpið hevur sent beinleiðis í sjónvarpinum ella á kvf.fo í 2025. Afturat hesum er útvarpsítróttur sum til dømis beinleiðis fótbóltur, Fótbóltsprát, Millum tøkini og sjálvandi 3-2, sum verður send í sjónvarpinum á leið 40 ferðir um árið.

**JANUAR**

25. Fyrsta steypakapping í estetiskum fiml. / kvf.fo

**FEBRUAR**

7. Ítróttarfagnaðurin 2025 / SV

21. Fótbóltur, kvinnur / Nations League / Slovakia – Føroyar / SV

22. Steypafinalurnar í hondbólti / SV

22. Onnur steypakapping í estetiskum fiml. / kvf.fo

25. Fótbóltur, kvinnur / Nations League / Gibraltar – Føroyar / SV

**MARS**

12. Hondbóltur, menn / EM-undankapping / Føroyar – Holland / SV

16. Hondbóltur, menn / EM-undankapping / Holland – Føroyar / SV

22. Fótbóltur, menn / HM-undankapping / Kekkia – Føroyar / SV

22. Triðja steypakapping í estetiskum fiml. / kvf.fo

25. Fótbóltur, menn / HM-undankapping / Montenegro – Føroyar / SV

28.-29. Dart / Tórshavn og Faroe Islands Open / kvf.fo

**APRÍL**

4. Fótbóltur, kvinnur / Nations League / Føroyar – Moldova / SV

8. Fótbóltur, kvinnur / Nations League / Føroyar – Gibraltar / SV

9. Hondbóltur, kvinnur / HM-røkkstøkk / Føroyar – Litava / SV

13. Hondbóltur, kvinnur / HM-røkkstøkk / Litava – Føroyar / SV

26. Judo, borðtennis og badminton / Stóri FM-dagurin / SV

**MAI**

4.-11. Fótbóltur, U17-gentur / EM-endaspæl / kvf.fo

8. Hondbóltur, menn / EM-undankapping / Føroyar – Kosovo / SV

11. Hondbóltur, menn / EM-undankapping / Føroyar – Ukraina / SV

15. Hondbóltur, menn / EM-lutakast / SV

18. FM í estetiskum fimleiki / SV

30. Fótbóltur, kvinnur / Nations League / Moldova – Føroyar / SV

31. Kappróður / norðoyastavna / SV og ÚV

**JUNI**

3. Fótbóltur, kvinnur / Nations League / Føroyar – Slovakia / kvf.fo

5. Fótbóltur, menn / Venjingardystur / Georgia – Føroyar / SV

9. Fótbóltur, menn / HM-undankapping / Gibraltar – Føroyar / SV

14. Kappróður / sundalagsstevna / SV og ÚV

22. Kappróður / jóansøka / SV og ÚV

29. Hondbóltur, U21 / HM-bronsudystur / SV

**JULI**

5. Kappróður / varmakelda / SV og ÚV

8. Fótbóltur, menn / Champions League / Víkingur – Lincoln Red Imps / SV

12. Kappróður / fjarðastevna / SV og ÚV

12.-18. Oyggjaleikir á Orknoyggjum / SV, ÚV og kvf.fo

19. Kappróður / vestanstevna / SV og ÚV

28. Kappróður / ólavsøka / SV og ÚV

**SEPTEMBER**

5. Fótbóltur, menn / HM-undankapping / Føroyar – Kroatia / SV

9. Fótbóltur, menn / HM-undankapping / Gibraltar – Føroyar / SV

**OKTOBER**

19. Fótbóltur, menn / HM-undankapping / Føroyar – Montenegro / SV

12. Fótbóltur, menn / HM-undankapping / Føroyar – Kekkia / SV

15. Hondbóltur, kvinnur / EM-undankapping / Ísland – Føroyar

18. Hondbóltur, kvinnur / EM-undankapping / Føroyar – Montenegro / SV

30. Hondbóltur, menn / Golden League / Føroyar – Holland / SV

**NOVEMBER**

1. Hondbóltur, menn / Golden League / Føroyar – Norra / SV

2. Hondbóltur, menn / Golden League / Føroyar – Danmark / SV

14. Fótbóltur, menn / HM-undankapping / Kroatia – Føroyar / SV

18. Fótbóltur, menn / HM-undankapping / Føroyar – Kasakstan / SV

22. Hondbóltur, kvinnur / Venjingardystur / Føroyar – Ísland / SV

26. Hondbóltur, kvinnur / HM-endaspæl / Føroyar – Montenegro / SV

28. Hondbóltur, kvinnur / HM-endaspæl / Føroyar – Spania / SV

30. Hondbóltur, kvinnur / HM-endaspæl / Føroyar – Paraguai / SV

**DESEMBER**

2. Hondbóltur, kvinnur / HM-endaspæl / Føroyar – Týskland / SV

4. Hondbóltur, kvinnur / HM-endaspæl / Føroyar – Serbia / SV

6. Hondbóltur, kvinnur / HM-endaspæl / Føroyar – Ísland / SV


Mentan

# Útvarp
# Føroyskar røddir, livandi søgur

**Útvarpið hevur framvegis ein stóran leiklut í gerandisdegi føroyinga, og nýggjastu lurtarakanningarnar geva greiða ábending um, at útvarpið enn eigur sítt fasta pláss í miðlanýtsluni hjá føroyingum.**

2025 var eitt ár, har fleiri broytingum vóru framdar í skránni. Endamálið var at styrkja um morgunflatuna og at senda beinleiðis útvarp við vertum fram til kl. 11 allar gerandisdagar. Eisini byrjaði útvarpið sum nakað nýtt at senda frá kl. 06.30 gerandismorgnar. Útvarpsskráin er bygd upp við flatum, har sent verður dagliga við sendingum og røðum, sum fevna sera breitt, bæði í formi og innihaldi. Gerandisdagarnir hava rútmu, har dagarnir líkjast, meðan vikuskiftini líkjast burturfrá.







### Morgunstundin

Byrjað verður í útvarpinum kl. 06.30 gerandismorgnar við sendingini Morgunstundin. Sendingin er ein rólig byrjan upp á dagin við tónleiki og tíðindastubbum. Vetrarmorgnar er eisini kunning um veður og koyrilíkindi. Sendingin vendir sær serliga til pendlarar og morgunfólk.

### Góðan morgun Føroyar

Hvønn gerandismorgun er Góðan morgun Føroyar á skránni frá klokkan 7.35 til 9.00. Evnisliga hevur sendingin stóra breidd, og málbólkurin er framvegis breiður. Alt frá serfrøðingum, veðurforsøgnum og kappingum til søgur kring landið er á skrá. Eisini hevur sendingin í størri mun havt beinleiðis tónleikaframleiðslur.

### Serfrøðingurin

Mikumorgun kl 9.05 er sendingin Serfrøðingurin. Í sendingini verður ljós varpað á eitt ávíst evni. Gesturin í sendingini hevur servitan á einum øki og greiðir frá hesum. Harafturat hava lurtarar møguleika at senda inn spurningar til serfrøðingin beinleiðis í sendingini. Nýggjur serfrøðingur er hvørja viku

### Vikan

Vikan sá fyrstu ferð dagsins ljós á heysti 2023. Vikan, sum er beinleiðis sending leygarmorgnar, tekur pulsin á vikuni, sum fer. Fyrra tíman vitjar ein aktuellur gestur útvarpsstovuna, meðan seinni tímin setir aktuellar søgur, hendingar og rák í nýtt ljós. Við kjaki, samrøðum og satiru geva vit føroyingum eina løtu til umhugsni við einum skeivum smíli. Ofta fær lurtarin eisini høvi at siga sína hugsan við at ringja ella senda skrivlig boð og spurningar.

### Akademia

Akademia er sendirøð við filosofiskum evnum, ið viðger støður og evnir, sum vit øll frá tíð til aðra spyrja: “Hvat er tað góða lívið”, “hví skulu vit gáa um og spyrja”, “hvat er vitan, og hvat er rong vitan” og mangt annað. Jógvan D. Hansen, námslektari, er gestur í sendingini.

### Orðaval

Á heysti 2024 sá nýggj málsending dagsins ljós. Orðaval er sending, ið viðger føroyskt mál á ymsan hátt. Skiftandi málkøn fólk gera sendingina saman við vertinum.

### Vágskálin

Vágskálin er sending við mentanarligum ummælum. Tveir ummælarar eru við hvørja ferð, og í flestu førum verða bøkur vigaðar á vágskálini. Ummælini verða gjørd sum samrøður í útvarpsstovuni, og brot verða spæld úr tí, sum ummælt verður. Á vágskálina kunnu eisini verða lagdir sjónleikir, framsýningar og framførslur. Serlig rák í tíðini verða viðhvørt vigað og viðgjørd.

### Kultura

Kultura er mentanarsending, sum viðger aktuel mentanarlig tiltøk og evni. Eisini verða evnir sett á breddan, ið treingja til viðgerð. Vit lata mentanina upp við hjartanum og viðgera mentanarrák við eldhuga, grundan og perspektivering.





## Røðir

Umframt størru flaturnar eru ein rúgva av røðum og støkum sendingum á skránni. Tær føstu og væl kendu sendingarnar eru m.a. Við Tórði á túri, Vikuskifti, Credo og Skratsj. Harafturat hava fleiri styttri og longri røðir verið á skránni í 2025.




**Skiftið**

Skiftið er poddrøð um skiftisárini hjá kvinnum. Eitt evni, sum ikki verður tosað so nógv um alment, men sum allar kvinnur so ella so skulu ígjøgnum.

Hvør partur hevur serfrøðingatátt, kvinnupanel við hugsanum og royndum, og innímillum fakta/tøl, sum verða kryddað eitt sindur.

**Svik á netinum**

Fleiri føroyingar hava upplivað kærleikssvik á netinum. Kærleikssvik er, tá svikarar royna at fáa fólk at trúgva, at tey hava funnið eitt persónligt ella romantiskt samband á netinum. Men í veruleikanum er endamálið hjá svikaranum at misbrúka álit og kenslur fyri at fáa pengar, gávur ella aðrar fyrimunir. Svik á netinum er sending í tveimum pørtum um íløgusvik og kærleikssvik. Vit hoyra bæði søgur frá fólki, sum eru vorðin snýtt, og frá bankafólki og Talgildu Føroyum, sum geva góð ráð um trygd á netinum.

**Kvinnur í ítrótti**

Kvinnur hugsa nógv um útbúgving, arbeiði og familju, tá ið tær skulu gera av, um tær skulu luttaka í ítrótti. Ungar gentur gevast fyrri og í størri tali enn dreingir við ítrótti, og kvinnur eru eitt nú minni virknar í liðbóltspølum enn menn. Í seks sendingum verður tosað við kvinnur, sum íðka ítrótt á ymiskum stigum.

**Tey brølandi tjúguni**

Tey brølandi tjúguni er stuttrøð í seks pørtum, sum viðger 1920-árini. Nógv nýggj rák gjørdu vart við seg, og í røðini fevna vit breitt – í bæði útlendskum og føroyskum høpi.

**Fyrsti løgmaður í heimastýrinum**

Andras Samuelsen var fyrsti løgmaður í føroyska heimastýrinum frá 1948 til 1950. Sendirøðin um Andras Samuelsen lýsir lívið hjá Andrasi frá tí, at hann verður føddur, til hann doyr í 1954. Samstundis er hon ein lýsing av teirri stremban og teimum stríðum, sum eru í samfelagnum hesi árini.

**Tær góvu lív**

Rigmor Restoff Dam arbeiddi í fleiri ár við at savna vitan um føroyskar kvinnur, sum eru deyðar í barsilssong. Fyri hana hevur tað týdning at minnast kvinnurnar fyri tað, tær vóru, tá tær vóru á lívi. Í sendingini tosa vit við Rigmor Restorff Dam um barsilsdeyða, og hvussu tað hevur ávirkað føroyskar familjur.

Við íblástri úr bókini hevur Kringvarpið eisini gjørt dokumentarin Góða mamma, har avvarðandi fortelja, hvussu tað hevur ávirkað teirra lív at missa mammu og konu til barsilsdeyðan.

**Doktor Sophus**

Í 1906 var ein hending í Klaksvík, sum skakaði alla bygdina. Læknin í bygdini doyði brádliga, og nógvar gitingar eru um, hvat hendi. Lurta eftir poddvarpsrøðini, har vit kava niður í hesa sera spennandi, hugtakandi og tragisku hending. Andras Sólstein gjørdi kanningararbeiðið, og hann greiðir frá. Kári Sólstein setti saman.

**Vinur mín í Vínlandi**

Djóni í Geil yrkti eina vísu í 1874, sum hann kallaði “Vinur mín í Vínlandi”, um vinmannin Johannus Sámalson, sum flutti til Amerika við konuni Agnes tvey ár frammanundan. Í dokumentarisku ljóðmyndini leita vit fram upplýsingar um nýgifta parið úr Havn og teirra lagnu. Magni Arge legði til ættis.

# Sjónvarp

Hóskvøld hava seinastu árini verið stóru filmskvøldini í Kringvarpi Føroya. So var eisini í 2025.





Tilsamans 28 ferðir kundi sjónvarpshyggjarin vera sitandi eftir Dag og viku hóskvøld og síggja nýtt, føroyskt framleitt dokumentartilfar – bæði einstakar sendingar og røðir.

Meginparturin er gjørdur av starvsfólkum á Mentanar-deildini í Kringvarpinum, og nakrar sendingar eru keyptar frá dugnaligum fríyrkisfólkum, sum eru vinir av húsinum, sum vit virðismeta høgt.

Niðanfyri kanst tú lesa um nakrar av teimum mongu sendingunum, sum vóru framleiddar og sendar í 2025 – frá stórum samfelagsspurningum og innlitum í list, mat, náttúru og lív, til persónligar lýsingar, skemt og smá brot úr gerandisdegnum.

**Morgunkórið**

Morgunkórið spratt úr eini verkætlan hjá morgunsendingini í útvarpinum. Tankin var at gera eitt nýtt kór við óroyndum sangarum.

Í sendingini fylga vit kórinum í fyrireikingunum til stóru 10 ára hátíðarkonsertina.

**Rúni Jákupsson og Gestur Janusarson Lómstein hava lagt sendingina til rættis.**

**Hvørvisión**

Jóhanna Norðberg Niclasen, í tónleikinum kend sum Sissal, vann danska Melodi Grand Prix við sanginum Hallucination. Í dokumentarinum fylgja vit Sissal fram til Eurovision, ið varð hildin í Basel í Sveis.

**Rúni Jákupsson og Gestur Janusarson Lómstein hava lagt sendingina til rættis.**

**Foytar Greyðir**

Kári Sólstein, Tróndur Vatnhamar og Jónfinn Stenberg løgdu til rættis. Hesaferð kaga Kári og Trondur niður í tiltiknu kókibókina "Matur & Matgerð" og fara út í Tindhólm, til Mikladals og inn til eina gamla konu at matgerða.

**Anna Maria 1807**

Í 1807 rendi skipið Anna Maria seg í bretska herskipið HMS Defense, sum legði hald á skipið.

217 ár seinni koma fornfrøðingar á Tjóðskjalasavninum í London fram á skjøl, brøv og sjey pakkar frá Onnu Mariu. Hvat stendur í brøvunum, og hvat er í pakkunum?

**Kári Sólstein og Jónfinn Stenberg løgdu til rættis.**

**Sjarma, sjálvsálit og lekkurt hár**

Ein heimildarfilmur um Ann Leivsgarð, sum er altjóða viðurkendur frisørur búsitandi í Keypmannahavn.

**Elin Mirjamsdóttir og Bárður Thomsen hava lagt til rættis.**

**Margreta**

Sendingin er portrett av Johannu Margretu í Buð í Hvannasundi. Hon fór aðrar leiðir enn javnaldrarnir, fór uttanlands og fekk sær tvær útbúgvingar, men flutti heim aftur til heimbygdina, tá hon bleiv pensionerað.

**Hans Petur Hansen og Tórður Mikkelsen hava lagt til rættis.**

**Góða mamma**

Hvussu ávirkar tað lívið, at mamman doyr í barsilssong? Í sendingini hitta vit nøkur av teimum, sum hava havt barsilsdeyðan heilt tætt inn at lívinum.

**Elin Mirjamsdóttir og Elin Dagbjartsdóttir Neshamar hava lagt til rættis.**





## Røðir

### Heim, kæra heim

Í "Heim, kæra heim" eru vit kring landið og vitja í húsum, sum á ymiskan hátt eru áhugaverd. Húseigararnir greiða frá eitt nú húsinum, innbúgvi, litum og hví heimið bleiv júst soleiðis.

Tríggir partar vórðu vístir í vár, og tríggir partar afturat vórðu vístir í heyst.

**Rannvá Fossáberg, Eyðun M. Thomsen og Jakob Jørgensen gjørdu sendirøðirnar.**

### Grønir fingrar

Í sendirøðini verður vitjað í vøkrum føroyskum urtagørðum, nýggjum sum eldri. Teir eru allir ymiskir, við ymiskum vøkstri og lendi. Urtagarðsrøðin í trimum pørtum skal geva íblástur, vitan og góð hugskot.

**Sára Jógvansdóttir og Jens Jákup Hansen løgdi sendirøðina til rættis.**

### Mett fyri minni

Sendirøðin í trimum pørtum er ætlað at geva hyggjarunum íblástur at eta stuttflutt og burðardygt.

Í sendingunum fylgja vit mat-aktivistinum Sunnivu Gudmundsdóttir Mortensen í leitanini eftir góðum og bíligum mathugskotum.

**Sunniva Gudmundsdóttir Mortensen, Finnur Koba og Jakob Jørgensen løgdu sendirøðina til rættis.**

### Útilív

Sendirøðin frá 2023 var so væl móttikin, at heitt varð á Jens Jákup Hansen at fara út aftur í hagan at gera tríggjar partar afturat at senda í apríl mánaði.

Endamálið við røðini er at eggja føroyingum til at njóta útilívið í Føroyum við at vísa á tær mongu upplivingarnar, sum bíða beint uttanfyri. Hesa ferð sæst Jens Jákup millum annað á rossabaki og á súkklu.

**Jens Jákup Hansen og Jónfinn Stenberg løgdu røðina til rættis.**

### Heðin Brú

Í tveimum pørtum verður kendi og fólkakæri rithøvundurin Heðin Brú lýstur. Heimildarrøðin er ein lýsing av manninum og hansara skaldskapi.

**Suni Merkistein og Hans Petur Hansen hava lagt til rættis.**

### Christian Matras

Heimildarrøðin um Christian Matras er í tveimum pørtum. Sendingin lýsir skaldið og málvísindamannin, sum gav okkum fyrstu orðabókina á føroyskum og yrkti nakrar av perlunum í føroyskum skaldskapi.

**Suni Merkistein og Hans Petur Hansen hava lagt til rættis.**

# Átrúnaður



# Stóru spurningarnir

Kringvarpið skal upplýsa, stimbra kjak og viðgerð av andaligum og átrúnaðarligum fyribrigdum og viðurskiftum, ið hava við tilveru okkara at gera.

Á skránni eru bæði afturvendandi sendingar og stakar røðir við tematiskum tilfari um trúgv, etikk og filosofi. Í 2025 kom tímatalið upp á 508 tímar, sum er meira enn undanfarin ár. Í útvarpinum sendu vit 433 tímar og 75 tímar í sjónvarpinum.

**Hetta heilaga evangeliið skrivar**

Sendingin verður send hvørt leygarkvøld kl. 17.45 og endursend sunnumorgun kl. 8.45. Ymsir prestar skriva til eitt kirkjuár í senn. Eitt kirkjuár byrjar og endar fyrsta sunnudag í advent.

Lis Samuelsen, prestur, skrivaði og las lesturin í 2025.

**Møti í útvarpinum**

Seks-sjey ferðir um árið senda vit evangelisk møti hjá Brøðrasamkomuni. Í 2025 sendu vit úr Lívdini í Hoyvík, Ebenezer í Havn, Samfelagsmøti við Tjarnir, úr Kristna-stovu í Keypmannahavn, Hebron í Leirvík, Hebron á Argjum, Betesda í Klaksvík og Vitinum í Hvalba.

Vanliga verða møtini send sunnudag kl. 17. Vit fáa tey sum lidna framleiðslu at senda.

**Ferðaliðið**

Ferðaliðið er toymið, sum tekur møti og gudstænastur upp hvønn sunnudag at verða send í sjónvarpinum. Hvønn sunnumorgun senda vit gudstænastuna og ofta eisini prædikuna hjá presti við teksti. Vit teksta sang og sálmar hjá fríkirkjunum, alt eftir hvussu nógvan tekst tey senda okkum. Tað liggur ikki enn í føstum karmi, tí ymiskt er, hvat prestar og fríkirkjur senda okkum av tilfari.

**Gudstænastur í útvarpinum**

Vit royna at út- og sjónvarpa gudstænastur um alt landið. Í útvarpinum og sjónvarpinum senda vit somu guds-tænastu beinleiðis.

Allahalgannaaftan senda vit gudstænastu úr Dómkirkjuni beinleiðis í útvarpinum.

Eisini senda vit, annan hvítusunnudag, uttandura gudstænastuna av ovara vølli í Gundadali í Havn.

Triðja páskadag sjónvarpa vit ta felags kirkjuligu gudstænastuna.

**Nýggjársgudstænastan**

Gudstænastan nýggjársaftan og nýggjársdag var í Vesturkirkjuni, har Bergur Debes Joensen, prestur, prædikaði.

Tórshavnar manskór, undir leiðslu av Jón Festirstein, sang pre- og postludium.
Barbara Holm las úr Prædikaranum.
Simona Eivinnsdóttir og Maiken Eivinnsdóttir Bringsberg sungu og spældu:
"Komi eg til tín", orð og lag eigur Steintór Rasmussen.

**Gudstænastur og møti**

Møtini og gudstænastur eru úr katólsku Mariukirkjuni, Hvítusunnusamkomuni, Kelduni, Oasuni, Adventistakirkjuni, Brøðrasamkomuni, Frelsunarherinum og Heimamissiónini.

**32 %**

sóu nýggjársgudstænastuna 31. desember 2025

## Andaktir í sjónvarpinum

**Ymisk og tó**

Vit hava roynt nýggjan andaktsleist. Vit eru farin út í prestagarðarnar og hava tosað við prestin á staðnum og eisini filmað kirkjuna og inni í vøkru, aldagomlu presta-gørðunum. Hesar andaktir hava vit nevnt "Ymisk og tó".

Sum eina roynd at nýhugsa, hava vit spurt samkomur, um tey kundu sent okkum andaktir at senda. Vit valdu at gera avtalu við Heimamissiónina at gera hesar sjónvarps-andaktir til páskir 2026. Tá má støða takast til, hvat KVF ynskir.

**Credo**

Credo er sending, har ljós verður varpað á lív og menniskju, teg og meg, etikk, filosofi og moral, kirkjur og samkomur, átrúnað her og úti, og prát við menniskju. Vertur er Armgarð Arge.

**Kallið**

Kallið er sending, sum var á skrá í 2025. Sendingin varpar ljós á prestar í fólkakirkjuni. Hvørji eru hesar kvinnur og menn? Og hvat var tað, sum gav teimum íblástur at lesa gudfrøði? Hvussu var lesturin, og vóru ávísar ella serstakar avbjóðingar? Hvat skrivaðu tey um í serritgerðini? Aftan á loknan lestur, hvussu var at fara í starv? Og hvussu við kallinum?

**Skrivað stendur**

Tvær tekstarøðir eru í kirkjuni. Tann fyrra stavar heilt aftur til ár 500, og seinna er frá 1895. Har eru tekstir úr Nýggja Testmenti savnaðir, og teir fylgja kirkjuárinum, sum byrjar fyrsta sunnudag í advent. Hesir vísu aldagomlu tekstir er enn viðkomandi, men hvussu lesa vit teir, og hvussu skilja vit teir?

Í sendingini "Skrivað stendur" lesa vit tekstin og siga frá hugtøkum og øðrum, sum er tongd at honum.

Armgarð Arge er samskipari á átrúnaðarliga økinum í Kringvarpinum.



# Børn og ungdómur



# Gott føroyskt tilfar til børn og ung

**Kringvarpið leggur stóran dent á at hava gott tilfar til børn og ung. Í 2025 vóru upprunaføroyskar framleiðslur gjørdar, til dømis KAKUMiKS, Hvat gera tit? og Les Vimús.**

Kringvarpið endurnýggjaði rættindini til 47 partar av góða, gamla Mumi, sum var framleitt í 1990unum. Eisini endurnýggjaðu vit rættindini til Sløkki Sam og framleiddu nýggjar partar av Labbaliðnum, sum eisini eru á VIT-appini.

Í 2024 og 2025 samstarvaði Kringvarpið við Havnar Bio um sýning av føroyskum barnafilmum, og hetta hevur verið sera væleydnað. Higartil eru filmarnir Klintrimús og hini dýrini í Vallbakkaskóginum og Palli Halaleysi vístir í Havnar Bio og øðrum mentanarhúsum.

Les meira um framleiðslur í 2025 niðanfyri.










## Barnasjónvarp

**KAKUMiKS**

KAKUMiKS er spennandi bakikapping fyri børn og ung, har 16 børn baka køkur og kappast ímóti hvørjum øðrum. Hetta er nýtt undirhald til størri børn. Tey eru tvey á hvørjum liði og brúka alla sína vitan og góða handverk fyri at koma allan vegin í finaluna.  Málbólkurin eru tey í aldrinum 9-14 ár, sum er málbólkurin hjá KVF MiKS. Tað er sera umráðandi at gera føroyskar sendingar, sum hesin málbólkur kann spegla sær í.

**Les Vimús**

Inni í holuni hjá Vimúsi eru nógvar bøkur, ja, eitt heilt músabókasavn. Vimúsi dámar væl at lesa søgur. Og eisini at siga frá søgum. Vimúsi dámar eisini at lurta eftir søgum. Og tí tímir Vimús væl at fáa vitjan.

Sendingin er tikin upp við chromakey, soleiðis at tað sær út sum, at vaksin sita á eini bók og lesa søgu inni á músabókasavninum hjá Vimús – reinur gandur at síggja til. Endamálið er í stuttum at fáa børn at lesa og lurta og síggja myndir úr bókini við ljóðmynd. Søgurnar vóru sendar í sjónvarpinum og samstundis tøkar á VIT-appini.

**Palli Halaleysi**

Teknifilmur har øll tosa og syngja á okkara egna máli – føroyskum!

Svenski klassikarin Palli Halaleysi, um góðsliga kettlingin við ongum hala, var sýndur í Havnar Bio í heystfrítíðini – fleiri sýningar vóru í Salt og í Løkshøll, og hann var sendur í sjónvarpinum jólaaftan og tøkur á VIT-appini.

Kringvarp Føroya hevur týtt, tikið upp og lagt røddir á filmin, so allar ketturnar tosa føroyskt. Filmurin er væl gjørdur og hevur góðan boðskap.

Føroyska framleiðslutoymið legði seg eftir at hava gott føroyskt mál, so allar løður og frensar, hundar og onnur, sum eru við, tosa okkara mál og málføri.

# Barnaútvarp

### At vera Vera

Útvarpsleikurin At vera Vera, sum Elin á Rógvi hevur skrivað, var at hoyra í barnaútvarpinum. Í 14 pørtum hoyrdu vit spennandi søgu um Veru, sum gongur í miðdeild í skúlanum á Argjahamri. Vera er stuttlig, djørv og hevur eitt frásøgufólk, sum hon kallar Frá.

Til nýggja sangin, sum var gjørdur til leikin, bar illa til at sita í frið – og tí var TikTok-dansur gjørdur til lagið. Høgni Fagraberg hevur gjørt lagið, spælt tónleikin inn og framleitt.

### Mórugøta

Jákup Veyhe hevur skrivað og framleitt tvær Mórugøtur. Í tveimum umførum og í alt tíggju sendingum hava vit hoyrt um Tey í Mórugøtu 8, sera væl umtókta útvarpsleikinum, sum børn og vaksin dáma væl at hoyra um morgnarnar í barnaútvarpinum. At hoyra væl kenda láturin hjá Jón og eyðkendu røddina hjá vikarinum og so at vita, at Kenneth altíð sigrar at enda.

### Vitello fer í skúla og Anna

Bókarøðin um drongin Vitello er sera væl dámd, og fleiri ferðir hava vit hoyrt um Vitello, ikki minst, tá ið hann fór í skúla. Vitello gongur í 1. flokki við Kammu, vit hoyra um matpakkar, fríkorter og mangt annað.

Vit hoyrdu eisini bøkurnar Anna 1 og Anna 2. Vit hoyra um Annu, sum er súr og troytt av øllum. Serliga, tí hon skal í nýggja skúlan aftan á frítíðina. Hon saknar síni gomlu hús og bestu vinkonu sína, Áslu. Anna er um góðar vinir, fitt dýr, seturskúla, familju og fótbólt.

### Her eru VIT

Í barnaútvarpinum hava vit Práta(ð) Poetiskt saman við Ævintýraferðini. VIT hava verið til staðar við VIT-mikrofonini, tá ið børn hava skrivað yrkingar, spælt sangleikin Leyvukong í Mentanarhúsinum, í 80 ára føðingardag hjá Pippi, til FM í skúlatalvi – alt í Fuglafirði. VIT hava hoyrt um Gandakendu náttina, um filmin hjá Noru og Stellu, um telefonir í skúlanum, tá ið Føroyar Lesa handaði virðislønirnar, Lesigleði, hvussu tað var hjá Sissal Jo at vera við í Grand Prix, tá ið Jóhanna vann SMS-VOX og tá ið Eysturskúlin hevði 45 ára føðingardag.

### Børnini VITa

Barnaráðstevna var Norðurlandahúsinum. 350 børn, sum eru í næmingaráðunum i Føroyum, vóru í Norðurlanda-húsinum. Her var arbeitt við fólkaræði og her vóru spennandi verkstovur. Endamálið var, at øll børn og ung í Føroyum fáa møguleika at koma við sínum í kasti til komandi barnalóg fyri Føroyar. VIT vóru við til søguliga hátíðarløtu, tá ið íkastið varð borið fram, og tað, at børn og ung hava havt ein so virknan leiklut at smíða eina lóg, eina barnalóg, tann fyrsta av sínum slagi í Føroyum.

### Syngja, lurta og dansa saman

Hvørt ár gera vit nógv burtur úr tónleiki. Vit hava varpað ljós á morgunsang. Knút Háberg Eysturstein granskar í sangi, og hann greiddi frá týdninginum av at syngja saman. Vit tóku báðar barnakonsertirnar upp hjá Føroya Symfoni-orkestri, tá ið børn úr øllum Føroyum hoyrdu "Veiða vind" og fjølbroyttan og væl kendan klassiskan tónleik. Eisini vóru vit við til kvæðastevnuna í Norðurlandahúsinum, tá vóru 1.200 børn úr miðdeild við.

### Betri vinir

Í barnaútvarpinum hoyrdu vit um Betri vinir. Vit vóru á Glyvrum, tí har arbeiða tey rættiliga nógv við Betri vinum. Hugtakið Betri vinir er kent um allan heim, og tá ið Hennara Hátign Mary Drotning vitjaði í Føroyum, vitjaði hon tey í Glyvra skúla, tí Mary drotning hevur arbeitt við hesi týdningarmiklu verkætlan, sum snýr seg um, at børn skulu hava ein tryggan felagsskap í gerandisdegnum. Eisini greiddi Tóra Petersen, sálarfrøðingur, frá.






### VITlíki

Í barnaútvarpinum varpaðu VIT ljós á vitlíki.

Hvat er vitlíki? Hevur vitlíki kenslur? Hví veit vitlíki so nógv um okkum? Í fimm barnaútvarpssendingum settu vit spurningar um vitlíki. Vit brúka vitlíki í okkara gerandisdegi, og vit spyrja vitlíki um støddfrøði, tónleik, kenslur, hvussu kamarið skal síggja út og mangt, mangt annað.

VIT tosaðu við ymsar serfrøðingar og børn, sjálvandi, sum eisini eru serfrøðingar. Í tveimum sendingum greiddi Tóri Slættalíð frá. Jóhanna Davidsen er sálarfrøðingur, og VIT spurdu, hvussu tað er at tosa við vitlíki, sum ikki hevur kenslur. Oddfríður Marni Rasmussen er lærari, og hann greiddi frá, hvussu vitlíki verður brúkt í skúlanum. Lena Anderssen er tónleikari, og vit hoyrdu hennara hugsan um vitlíki, tá ið tað kemur til list og tónleik.

# Tónleikur



# Sløk 65 prosent av spælda tónleikinum var føroyskur

**Í 2025 var føroyskur tónleikur væl umboðaður í útvarpinum. Sambært sendiskipanini var umleið 65 prosent av spælda tónleikinum føroyskur. Kringvarpið framleiddi og sendi harumframt eina rúgvu av tónleikasendingum, konsertum og serligum tiltøkum í bæði sjónvarpinum og útvarpinum.**

Undirtøkan var betri enn nakrantíð, tá ið Kringvarpið í februar leitaði eftir ársins útvarpshitti. 10.420 atkvøður vóru greiddar á heimasíðu okkara. Tá avtornaði var tað Jóannes Joensen, eisini nevndur Bass Elvis, ið fekk flestar atkvøður við Tú skalt syngja tær ein sang.

Fleiri regluligar tónleikasendingar eru í útvarpinum. Ein teirra er Mono, sum verður bjóðað út á hvørjum ári. Í røðini verður miðað eftir at gera upplýsandi sendingar um ymisk tónleikasløg. Í hesum umfari hava fríyrkisvertir eitt nú umrøtt triphop, føroysk dansiløg, slóðbrótandi framleiðarar og svensku hitt-verksmiðjuna.

Tríggar ferðir um vikuna er sendingin Eitt korter. Har spæla og umrøða skiftandi vertir ymsar tónleikagreinar. Eitt nú kór, jazz og klassiskt.

## Hvørjum tónleikasendingum hjá Kringvarpinum lurtaði tú eftir í gjár hósdagin 2. oktober?





Ein leygardag í hvørjum mánaði hittist Plátupanelið í tveir tímar at skifta orð um eitt ár ella ávíst evni. Í Ragnarrokk verður tosað við kendar tónleikarar úti í heimi um nýggjar útgávur, og Kvørnin melur aftur og umrøður føroyskar tónleikaútgávur og stakløg.

## Hvørjum tónleikasendingum hjá Kringvarpinum lurtaði tú eftir leygardagin 1. februar?







Sunnudagar ber nú aftur til at hoyra kendu sendingarnar hjá Janusi Mohr við fosturlands-sangum. Kringvarpið hevur keypt handritini og dagført sendingarnar.

Fleiri nýggjar tónleikasendingar komu á skrá í 2025. Eitt nú Nýtt ljóð, ið setir sjóneykuna á nýggjastu føroysku sangirnar, ið eru komnir út.

Beinleiðis úr Studio 5 bjóðar øllum, ið hava hug og evni, í útvarpsstovuna at spæla livandi tónleik. Millum tónleikagestirnar, ið hava tikið av møgu-leikanum, teljast Døgg Nónsgjógv, Teitur, Herborg Torkilsdóttir og Hans Andrias.

**Nøgvur føroyskur tónleikur í sjónvarpinum**

Lagt var sum vant fyri í januar við veitsluhýri og hátíð, tá ið Nýggjárskonsertin var í Norðurlandahúsinum. Føroya Symfoniorkestur, solistar og stóra kórið høvdu eina undirhaldandi skrá við miklum verkum frá stórum komponistum.

Í mars var FMA í Varpinum í Klaksvík. Økistónar vunnu ársins átak, Beinir fekk áhoyraravirðislønina, Gówa gjørdist ársins spíri, og MC Restorff fekk tóneikaheiðurin.Tónleika-kappingin Sement hevur ment seg til ein góðan møguleika at gera vart við seg á føroyska tónleikapallinum. Kappingin var hildin á Reinsarínum í Havn. Kringvarpið vísti tvey av trimum undanumførum umframt sjálva finaluna, ið Hans Andrias vann.

Sissal var ein av átta sangarum, ið vóru á palli í Melodi Grand Prix í Herning. Hon vann og tryggjaði sær soleiðis luttøku í Eurovision, sum var hildið í Basel í Sveis. Har eydnaðist Sissal at syngja seg víðari. Kringvarpið segði frá og gjørdi dokumentar um fyrsta føroying nakrantíð í Eurovision-finaluni.

Sum vant vórðu fleiri konsertir sendar um jólini – bæði upptøkur, sum Kringvarpið hevði gjørt, og framleiðslur gjørdar uttan fyri húsið.

Vit sendu árligu jólakonsertina í Ebenezer í miðbýnum í Havn, har Ebenezerkórið og gentukórið Aloe sungu saman við solistum. Árliga jólakonsertin í Runavík, Jól við Løkin, var send í tveimum pørtum.

2. jólakvøld var jubileumskonsertin Aldubáran 30 ár í sjónvarpinum. Bólkurin, ið er mannaður við okkara bestu úrmælingum, spældi nýggjan tónleik hjá ungum tóna-skøldum á hátíðarhaldi í Hátúni.

Tónleikasamskipari í Ksringvarpinum er Rúni Jákupsson.

# Public service



Kringvarp Føroya hevur, sum sjálvstøðugur, almennur stovnur, týðandi public service-skyldur mótvegis Føroya fólki. **Kringvarpið skal miðla og mynda føroyska mentan í breiðastu merking.**

Stovnurin hevur somuleiðis alstóran týdning fyri fólkaræðið í landinum, tí hann í virksemi sínum varpar ljós á og elvir til kjak um samfelagsviðurskifti.






## Savnsgull

Ein lógarásett public service-skylda hjá Kringvarpinum er at tryggja, at alt sent tilfar verður varðveitt og skrásett í kringvarpsavninum.

Savnsgull er verkætlanin, hvørs fyrri partur snúði seg um at bjarga tilfarinum í savninum hjá Kringvarpi Føroya. Í savninum er tilfar, sum lýsir modernaðu søgu føroyinga – frá 1957 til í dag. Endamálið hjá Savnsgulli er, í fyrsta lagi, at talgilda savnið og í øðrum lagi at geva almenninginum atgongd til tilfarið.

Fyrri partur av verkætlanini, sjálv talgildingin, var liðugur í 2023.

**Atgongd til kringvarpssavnið**

Í sáttmálaskeiðnum verður kringvarpssavnið latið meira upp fyri fólki, og harvið verður sett hol á seinna partin av Savnsgull-verkætlanini. Í nógvum førum eru møguleikar fyri at fáa nýtt lív í eldri tilfar og at brúka savnstilfarið á nýggjan hátt.

Í 2025 var nýggjur verkætlanarleiðari settur at taka sær av seinna partinum av verkætlanini, og tilfar í savninum verður so líðandi skrásett rætt og harvið fyrireikað til almannakunngering. Eitt stórt arbeiði liggur tó í at kanna upphavsrætt og menna tøkniligt kervi, áðrenn savnið gerst fult atkomuligt.

## “Samrøðan við samfelagið”

Visjónin hjá Kringvarpinum er at vera fremsti mentanarberi føroyinga. Øll fólk í Føroyum skulu fáa eitt virði burtur úr tilfarinum, sum Kringvarpið framleiðir. Við hesum í huga arbeiðir Kringvarpið sambært miðvísari arbeiðsætlan, sum skal virka innan fyri karmarnar í public service-sáttmálanum.

Enn er høvuðsmálið ikki rokkið. Fyri at røkka tí eru átøk sett í verk á trimum økjum: (1) styrkja tøkniliga infrakervið, (2) tillaga framleiðsluætlanir fyri deildirnar Aktuelt og Mentan og (3) seta í verk og skipa starvsfólka- og førleikaætlanir. Kumpassin at halda eyga við gongdini er regluligar kanningar av nøgdsemi, áliti og nýtslu millum fólk í landinum.

**Styrkja tøkniliga undirstøðukervið**
***– talgilda snaringin***

Seinastu árini hevur Kringvarpið verið í eini tilgongd at menna tøkniliga undirstøðukervið og at talgilda arbeiðsgongdirnar. Millum annað eru nýggjar framleiðsluskipanir til útvarp og sjónvarp keyptar, og útvarpsskipanin var smátt um og smátt tikin í brúk í 2025. Uppstigan av kvf.fo var eisini sett í verk í 2025, hetta arbeiðið væntast at vera liðugt í 2026. Málsetningurin er framhaldandi at vera fremsti tíðinda- og samskiftispallur hjá fólki í Føroyum.

**Tillaga framleiðsluætlanirnar**
***– vit seta dagsskránna***

Ein liður í arbeiðnum at røkka høvuðsmálinum er meira miðvísar sendingar, t.e. sendingar, hvørs málbólk Kringvarpið kennir, og harvið kann skapa meirvirði fyri. Ávís starvsfólk arbeiða miðvíst við útgávuætlanum fyri sendingar, herundir ásetan av málbólki, marknaðarføringsætlan og eftirmeting.

Evni, sum hava samfelagstýdning, verða sett á skrá, og deildirnar arbeiða proaktivt við evninum í ávíst tíðarskeið.

**Skipa starvsfólka- og førleikaætlanir**
***– Kringvarpið skal vera sín egni útbúgvingarstovnur***

Støðugar broytingar í samfelagnum, eitt nú nýggir miðlar og broyttir miðlavanar, krevja, at KVF kann tillaga seg skjótt og fylgja við nýggjari tøkni og arbeiðsháttum. Við áhaldandi skeiðsvirksemi tryggja vit okkum, at starvsfólkini hava neyðugu vitanina og kunnleikan at fylgja við broytingum. Skeiðsskrá er gjørd, har skeið og førleikamenning verða skrásett líðandi. Eisini er samband við Setrið og aðrar hægri lærustovnar um viðkomandi eftirútbúgvingar til starvsfólkini.

## Tænastur til fólk, ið bera brek

Kringvarpið teknmálstulkar í samstarvi við viðkomandi partar tíðindi og sendingar, ið hava stóran samfelagsáhuga, beinanvegin. Kringvarp Føroya samskiftir og samstarvar við deyvaumhvørvið, so at játtanin til teknmálstulking verður brúkt á skilabesta hátt. Í hesum sambandinum er studio til teknmálstulking í Kringvarpinum.

Tíðindasendingar og gudstænastur í sjónvarpinum verða tekstaðar. Sendingar, ið hava stóran samfelagsáhuga og -týdning, eitt nú valsendingar og viðkomandi dokumentarsendingar, verða tekstaðar skjótast gjørligt. Kringvarpið sendir beinleiðis tekstfrásøgn frá tíðindafundum, sum snúgva seg um tilbúgving.

Teknmálstulkaðar sendingar eru at finna á KVF Sjón.

## Partur av tilbúgvingini

Kringvarpið er partur av Tilbúgvingarskipan Landsins. Avvarðandi myndugleikar hava listar við nøvnum og telefonnumrum, ið skulu nýtast, kemur samfelagið í eina støðu, har tørvur er á tilbúgving. Tað merkir, at Kringvarpið eftir lítlari løtu kann varpa út, um eitthvørt álvarsamt hendir.

Nógv dømi eru um týdningin av greiðum almennum samskifti í sambandi við neyðstøður. Kringvarpið hevur havt aktivan leiklut í slíkum hendingum. Seinastu árini kunnu nevnast eldsbrunin á Varðanum Pelagic í 2017 og skriðulopini í Klaksvík í 2022. Eitt meira umfatandi dømi er koronukreppan, sum í Føroyum vardi frá mars 2020 til februar 2022, og har Kringvarpið var dúgliga nýtt í almenna tilbúgvingarsamskiftinum.

Kringvarpið hevur ein eyðsýndan leiklut í tilbúgvingini, og greið mannagongd er gjørd saman við hinum pørtunum í tilbúgvingini um skyldurnar hjá Kringvarpinum í hesum sambandi.



KRINGVARP
FØROYA